# Trek byrjan


*The Story Ends sangarin bað áskoðararnar um umbering fyri ringu konsertina*
*mynd: nud*

**The Story Ends mistu pippið, tá stórir trupulleikar við ljóðinum oyðiløgdu konsertina í Virkishúsinum**

SUMMARFESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

The Story Ends var fyrsti bólkur at fara á pallin í Virkishúsinum í Klaksvík í gjárkvøldið og hetta var eina framførsla ið eg trúgvi eg, bæði bólkur og áskoðararar kundu eins væl verið fyri uttan.

Bólkurin skuldi eftir skránni byrja kl. 18, men klokkan var nærri 19, tá The Story Ends komu til Klaksvíkar. Fólk var komið og farið og nýtt var komið til. Hvør eigur feilin, veit eg ikki, men avtalan var eftir øllum at døma, at bólkurin skuldi byrja kl. 19, meðan skráin fyri Summarfestivalin segði 18. Hetta er óheppið og irriterandi.

Tá klokkan var nakrar minuttir yvir sjey, byrjaði bólkurin endiliga at spæla. Men ljóðið var andskræmiligt. Tey ljóðkønu stríddust eitt hart stríð, men klokkan nærkaðist 19.30, áðrenn ljóðið gjørdist nøkulundað. Tá hevði bólkurin mist pippið, og tyktist mest sum uppgevandi. Hetta klæddi illa teirra eitt sindur fandenivoldska tónleiki. Tað var ikki fyrr enn í allar síðsta lagnum, at eitt sindur av gleðini kom aftur. Bólkurin byrjaði at jamma og fjasa eitt sindur, og tyktist at hava tað stuttligt, men hetta var tíanverri stuttligari hjá teimum enn áskoðarunum.

Samanumtikið kann konsertin ikki ummælast, ljóðið var stutt sagt ov ringt. Bólkurin kann tó í ávísan mun lastast fyri ljóðið, teir hava spælt í hølunum áður, og áttu at verið komnir í betri tíð um tað var neyðugt. Her skein manglandi rutinan ígjøgnum, og vísti hvussu ungur og óroyndur hesin bólkur í veruleikanum er, hóast umstøðurnar vóru tær somu hjá hinum bólkunum, ið spældu í somu hølum, so hevði hvørki Isadora ella Budam nakrar trupulleikar. Her er annars talan um ein tann mest lovandi unga bólkin í Føroyum. Við miðvísari venjing og arbeiði við tónleikinum, kann The Story Ends við tíðini gerast ein sera góður bólkur.

# Isadora blásti alt um koll


*Isadora hevur tikið blokkfloytuna inn í rokktónleikin*
*mynd: nud*

**Isadora and The Rebels spældi ein frálíka konsert í Virkishúsinum, bólkurin er líka føroyskur sum Týr og líka altjóða sum Portishead.**

SUMMARFESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir eina heldur treka byrjan á upphitingina til Summarfestivalin við The Story Ends, blásti Isadora and The Rebels Virkishúsið í Klaksvík um koll. Eg mangli lýsingarorð at lýsa framførsluna, sum stutt sagt var frálík.

Eg havi ongantíð uppliva Isadoru og rebellarnar áður, og hóast eg bert havi hoyrt jalig viðmælir, so varð eg fullkomiliga tikin av bóli. Isadora and the Rebels er ein framúrskarandi bólkur. At songkvinnan Guðrið Hansen er frálík visti eg væl, men í hesum bólkinum er hon veruliga í essinum. Talan er um teirra heilt egna sera gjøgnumførda tónleikabland, sum vevur m.a. spælimanstónleik, vísusang, 70'ára tung málm, 90'ára rokk, indi rokk og alt møguligt annað saman í ein dýrabæran vavstur. Eg haldi á onkran hátt, at hetta er líka føroyskt sum Týr og líka altjóða sum Portishead. Eg havi ikki hoyrt tílíkan tónleik áður, men hann er bergtakandi. Ljóðumstøðurnar eru ikki verðins best í Virkishúsinum, men Isadora and the Rebels megnaði at spæla uppum umstøðurnar, og við eini sera dedikeraðari framførslu leveraðu tey vøruna 200%.

Tað var serliga stuttligt at síggja hvussu Guðrið er á pallinum, hon er miðdepilin í bólkinum, og stýrir honum við eini sterkari hond, hon er ikki bangin fyri at taka ábyrgd av framførsluni. Hetta kom t. d. til sjóndar, tá trupulleikar vóru við gittaranum hjá gittarleikaranum Bartali. Í staðin fyri langan og keðiligan steðg, skar Guðrið ígjøgnum og spældi saman við restini av bólkinum pausutónleik, hetta hóast onkur tónleikari tyktist at hava hug til at muta ímóti. Hetta vísti innlit í tað, at ein framførsla leggur ábyrgd á herðarnar hjá teimum í standa á pallinum, at undirhalda tey, ið lurta, eitt innlit sum forbiðið nógv føroysk listafólk ikki hava.

Tað er eisini heilt ótrúliga lekkurt at hoyra blokkfloytu í rokktónleiki, takk fyri tað Guðrið.

# 1.000 atgongumerki eftir til Summar Festivalin

Tað gongur betur enn nakrantíð við at selja atgongumerki til Summar Festivalin, sum verður í Klaksvík um vikuskiftið. Eini 8.000 fólk hava nú tryggjað sær atgongumerki til festivalin, og fyriskipararnir boða nú frá, at bert 1.000 atgongumerk verða seld afturat í forsølu.

Fyrireikararnir siga, at tað er umráðandi, at øll fólkini, sum koma á festivalin, fáa eitt gott upplivilsi, og tí verða ikki seld meira enn 9.000 atgongumerki til festivalin í ár.

So tey, sum vilja sleppa inn at hoyra bólkar sum The Rasmus, Shu-Bi-Dua, Johnny DeLuxe, David Phelps og allar hinar, skulu bera skjótt at fyri at fyri at tryggja sær atgongumerki.

**-mørk**

# Selja fløgur til eingin vil keypa tær

**Sólarn Solmunde dagligur leiðari í Leikalund hevur longt upplatingartíðina í fløguhandlinum, og er til reiðar at leingja hana uppaftur meira um tørvur verður á tí.**


*Sólarn Solmunde er dagligur leiðari í Leikalund*
*mynd: nud*

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fløguhandilin í Klaksvík, Leikalund hevur spent seg út til allar festivalarnar í summar, og nú Summarfestivalurin er har í býnum, hevur handilin opið til kl. 23 bæði kvøldini, sigur Sólarn Solmunde dagligur leiðari, men sigur samstundis, at hetta vegleiðandi afturlatingartíð, og at um fólk eru í handlinum, ið ætla sær at keypa, tá klokkan er farin av 23, so verður upplatingartíðin longd.

Leikalund hevði ein bás á G!Festivalinum, men hevur ikki bás á Summarfestivalinum. Sólarn sigur orsøkina til hetta vera einfalda, í Klaksvík kenna øll handilin, meðan støðan er ein onnur í Eysturoynni. Við at luttaka á G! fekk handilin víst andlit og soleiðis marknaðarført seg fyri einum nýggjum málbólki. Hann letur eisini sera væl at søluni á G! og sigur, at Leikalund seldi hasar 3 dagarnar líka nógvar fløgur, sum tey vanliga selja ein heilan mánað. Fleiri fløgur vóru útseldar t.d. Animal Alpha og Kaizers Orchestra.

Festivalnøvnini hava selt væl í Leikalund summar, men seinastu dagarnar er tað serliga fløgurnar hjá The Rasmus, Johnny Deluxe og David Phelps sum hava gingið sum heitt breyð.